# ítróttur

Nr. 30 • fríggjadagur • 13. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Guarini heldur nógv av føroyskum spælarum

**– Føroyskir spælarar hava ov langan vetrarsteðg, og tað merktist, tá ið vit byrjaðu venjingina her í felagnum, sigur venjarin hjá Fremad Amager, sum tó heldur, at føroyskir spælarar hava rætta hugburðin. Hann hevur fýra føroyskar spælarar í sínum hópi**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*– Við okkara fíggjarligu møguleikum eru føroyskir spælarar áhugaverdir. Tað eru nógvir spælarar, sum hava talent, men ikki allir hava tann hugburð, sum føroyskir spælarar hava, sigur Michele Guarini, venjari í Fremad Amager*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Føroyingar hava rættiliga gjørt innrás í Fremad Amager í danska høvuðsstaðnum.

Føroyingar hava í nógv ár hildið til í stórum tali á Amager – ikki minst á Oyrasundskolleginum – men nú eru teir eisini at síggja á vøllinum hjá lokala fótbóltsfelagnum.

Jann Ingi Petersen, Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum og John Heri Dam eru allir við í 1. liðhópinum hjá Fremad Amager, og allir uttan John Heri hava sáttmála við felagið fyri í minsta lagi í eitt ár.

– Føroyskir spælarar hava rættan hugburðin til fótbóltsspælið. Teir eru ídnir og vilja gera alt fyri at vinna. Harafturat er tað ein stórur fyrimunur fyri okkum, at teir kempa fyri at verða við á føroyska landsliðnum, sigur Michele Guarini, venjari í Fremad Amager.

– Felagið fær kanska tríggjar spælarar við til HM-dystin ímóti Fraklandi, og tað er neyvan komið fyri fyrr her í felagnum.

## Arbeiðaraklassin

Fremad Amager er eitt siðbundið felag og hevur altíð verið tvinnað saman við fólk í arbeiðaraklassanum. Men soleiðis er ikki longur. Venjarin vil gera upp við gomlu traditiónina, tí hann heldur, at felagið kann gerast offur fyri sínari egnu mytu, og hetta hevur skapt órógv á Amager.

Á heimasíðuni hjá felagnum verður dúgliga kjakast um samleikan hjá Fremad Amager, sum ikki er til at kenna aftur – millum annað tí at venjarin hevur skift allar teir gomlu spælararnar út og hevur brúkt heilar 61 spælarar á liðnum seinastu tvey árini.

## Føroyingar í fokus

Í Tipsblaðnum fríggjadagin er drúgv grein um Fremad Amager og ta uppgerð, sum hevur verið í felagnum, og her verða eisini føroyingarnir drignir fram.

Tí trúgvu áskoðararnir á Sundby Idrætspark, har Fremad Amager spælir sínar dystir, kenna næstan ikki spælararnar á liðnum longur, og nú skulu teir venja seg við fýra nýggjar føroyskar spælarar.

Men venjarin verður ikki tikin av fótum av atfinningunum.

– Við okkara fíggjarligu møguleikum eru føroyskir spælarar áhugaverdir. Tað eru nógvir spælarar, sum hava talent, men ikki allir hava tann hugburð, sum føroyskir spælarar hava, sigur Michele Guarini.

## Verri fyri enn danir

Í hesum døgum venja spælararnir hjá Fremad Amager til seinnu hálvu í donsku kappingini, sum byrjar um hálvan annan mánað.

Venjingin hesa ársins tíð skal byggja upp formin, sum skal bjarga Amager í næstbestu deildini, og tað verður gjørt við harðari venjing og venjingardystum.

– Føroyskir spælarar hava ov langan vetrarsteðg, og tað merktist, tá ið vit byrjaðu venjingina her í felagnum. Teir føroysku spælararnir vóru eitt sindur verri fyri kropsliga, enn hinir spælararnir í felagnum, sum hava vant allan vetur, men teir eru við at koma seg, sigur Michele Guarini.

– Eg haldi, at føroyingar skuldu umhugsa at longt kappingarárið ella í minsta lagi at vant meira um veturin, so at spælararnir ikki missa so nógv av forminum um veturin, heldur hann.

## Sleppa at royna seg

Fremad Amager hevur spælt fimm venjingardystir í hesum árinum, og føroysku spælararnir hava roynt seg í hesum dystum. Enn ber ikki til at siga nakað um, hvørt føroysku spælararnir fáa fast pláss á liðnum, tí í venjingardystunum verða nógvar uppstillingar royndar, og flestu spælararnir fáa spælitíð.

Jann Ingi Petersen hevur spælt á sentrala miðvøllinum, meðan Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum hava roynt seg í álopinum. Enn eru tað ikki blivin til mongu málini, sum teir báðir skoraðu í Føroyum, men Hjalgrím skoraði eitt mál fyri einari góðari viku síðani.

Í gjárkvøldið skuldi Fremad Amager spæla ímóti Lyngby, og tá varð John Heri Dam, sum hevur vant við 1. liðshópinum, men hevur spælt við 2. liði hjá Frank Skytte, tikin út til dystin.

## Týdningarmikil dystur

Fremad Amager er ikki nakað stórfelag, og umstøðurnar í felagshúsunum á Amager eru einki betur, enn flestu føroysku feløgini kunnu bjóða sínum spælarum. Men fótbóltsliga avbjóðingin hjá teimum føroysku spælarunum er eitt vet størri enn í Føroyum, og so er møguleikin altíð at gera vart við seg í donskum fótbólti og koma víðari til eitt størri felag.

Tá ið landskappingin byrjar aftur seint í mars mánaði, leggur Fremad Amager fyri við einum týdningarmiklum dysti, sum antin kann geva teimum luft í botnstríðnum ella blanda teir enn meira upp í kampin fyri at yvirliva í næstbestu donsku deildini. Og tað skal gerast við fýra føroyskum spælarum í felagnum.



StÍF-Neistin 23-24 (9-12):

# Við bit og slit

**Neistin var um reppið at vera fyri einum sera óvæntaðum tapi, tá tær vitjaðu á Skála leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Við ellivu av Neista-málunum var Simona Dziugyte enn einaferð týdningarmesta álopsvápnið hjá Neistanum*

Í mikudagsútgávu okkara skrivaðu vit, at talan í stóran mun var um avgreiðsluspurningar, tá tríggir hondbóltsdystir í bestu kvinnudeildini skuldu leikast um vikuskiftið. Hjá Stjørnuni og VÍF var heldur ikki stórvegis roks, tá tær skuldu vinna sær síni stig, men hinvegin stóð heilt nógv á hjá Neistanum.

Neistin vitjaði á Skála hjá StÍF, og júst sum í grundspælinum var tað um reppið, at Neistakvinnurnar máttu fara stigaleysar til hús aftur.

## Spennandi hálvur tími

Fyrra hálvleik sá annars út til, at Neistin skuldi fáa alt við sær aftur. Munurin var kanska ikki tann heilt stóri, men Neistin helt alla tíðina fast um leiðsluna, men um miðjan seinna hálvleik kom stígur í.

StÍF stríddi seg upp á javnt, og fimm minuttir fyri leiklok stóðu 22-20 á stigatalvuni. Neistin fekk tey bæði næstu málini, men hóast heimaliðið royndi at venda gondini við einum time-out, so eydnaðist hetta ikki, og so var seinsta málið í dystinum bara ein fátøk troyst. Stig komu eingi, og so er spurningurin, hvørt hetta togar huglagið hjá strandakvinnunum enn meira niður, enn tað hevur verið í seinastuni, ella um liðið nú hevur fingið styrkt um vónirnar undan dystinum móti Kyndli, sum væl kann gera av, hvørt liðið fer at søkka heilt niður á botn ella ikki.

## Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 23-24 (9-12)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Milica Ergic 8(2), Ninna Katrin Johansen 6, Anna B. Danielsen 5, Ann-Mari Østerø 1, Sunfríð B. Jacobsen 1, Beinta Joensen 1, Paula B. Høgnesen 1
**Neistin:** Simona Dziugyte 11(2), Marjun Tróndarson 4, Lina Andriulyte 4, Ása á Neystabø 2, Lív Sørensen 2, Unn Kragesteen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Neistin 3
**Útvísingar:** StÍF 4, Neistin 6
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum

# Greiðari flytingarreglur

**Miðjað verður nú eftir, at hendingin frá dystinum millum AB og Sumba ikki skal endurtaka seg. Ikki færri enn tvær lógarbroytingar skulu forða fyri hesum**

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*



Øgiligt rumbul tók seg upp í fjør heyst, tá AB og Sumba fóru at klandrast um, hvørt ein leikari hjá AB hevði leikt ólógliga ella ikki, tá liðini bæði hittust.

AB vann dystin úti á Argjum, men tað vórðu at enda sumbingar, sum fingu stigini við sær, tá dómsnevndini gjørdi av, at leikarin hevði fingið leikloyvi útflýggjað undir skeivum fortreytum. Hetta hóast tað í útgreiningunum til kappingarreglurnar var staðfest, at er leikloyvi útflýggjað, so kann spurnartekin ikki setast við hetta.

Trupulleikin ta ferðina var, at AB helt leikaran vera leysan av vanligu flytingarreglunum, tá hann eitt skifti hevði verið í Danmark, men júst hetta verður nú lýst neyvt í kappingarreglunum. Her kemur at standa, at skráseting og loyvisbræv er í gildi, til felag gevur kappingarevndini skrivliga fráboðan um, at viðkomandi leikari ikki longur leikara fyri felagið.

Hartil verður nú eisini lagt uppfyri teimum støðum, sum fleiri ferðir eru komnar fyri, tá kappingarnevndin í evstu løtu verður biðin um at avgreiða eitt leikloyvi. Dømi um hetta var eisini hendingin við AB og Sumba, har argjamenn í evstu løtu komu við umbøn síni, sum soleiðis varð viðgjørd, uttan at alt tað neyðuga skjalatilfarið fyrilá ella varð fingið til vega.

Grein 15 í kappingarreglunum kemur nú at staðfesta, at kappingarnevndin kann áseta í kunngerð nærri reglur millum innlatan av umsókn og frávik hesum viðvikjandi.

Tað vil við øðrum orðum siga, at um kappingarnevndin ynskir tað, so kann nú ásetast, nær nevndin í seinsta lagi skal hava eina umsókn um leikloyvi. Eisini verður í viðmerkingini staðfest, at við »umsókn« skal skiljast, at alt viðkomandi skjalatilfar fyriliggur í málinum, soleiðis at nevndin hevur haldgott grundarlag at byggja sína støðu á.

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 449 | 344 | 105 | 19 |
| 2 VB | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 425 | 322 | 103 | 16 |
| 3 VÍF | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 439 | 357 | 82 | 15 |
| 4 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 409 | 362 | 47 | 14 |
| 5 StÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 357 | 420 | -63 | 5 |
| 6 Søljan | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 301 | 399 | -98 | 4 |
| 7 Kyndil | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 260 | 436 | -176 | 1 |

**Máltindurin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 140 | (23) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 117 | (22) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 117 | (30) |
| Ioana Rápa | VÍF | 104 | (25) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 97 | (20) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 91 | (20) |
| Daiva Tuomaite | VB | 87 | (15) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 82 | |
| Irina Rodevici | VÍF | 81 | |
| Milica Ergic | StÍF | 81 | (10) |
| Gurið Mortensen | VB | 79 | (6) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 73 | (18) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 71 | (5) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 70 | (24) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 64 | |

# Føroyskt transfer-vindeyga

Eins og flestu av londunum kring okkum hava gjørt tað, ætlar FSF nú eisini, at leikaraskifti í føroyskum fótbólti skulu fara fram innan eitt sonevnt transfer-vindeyga.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at føroysku fótbóltur kemur at fáa ein vetrar- og ein summarmarknað, har feløgini hava møguleika at keypa ella selja leikarar, meðan tað annars skal vera friður á marknaðinum.

Skotið verður upp, at tað verða átta vikur í tíðarbilinm millum kappingarár, har leikaraskifti kunnu fara fram, eins og tað verður loyvt at knýta leikarar at felagnum frá seinsta leikdegi undan summarsteðin til tveir dagar undan uppafturtøku av landskappingini.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur FSF, at hetta fer at virka til, at feløgini undir kappingini fáa nýtt orkuna til aðrar lutir enn at ansa eftir egnum leikarum ella leita sær eftir nýggjum leikarum, eins og tað gevur venjarunum ein møguleika at vita, hvussu hópurin sær út, longu tá farið verður undir fyrstu venjingarnar.

Hartil metir FSF, at hetta í ávísan mun kann virka til at skapa stabilitet hjá feløgunum, eins og feløgini við hesum eisini verða meira javnt stillað.

**-jm**